


# Vegleiðing at geva upp skatt 2021

Nú er klárt at avgreiða skattin fyri 2021. Í tí sambandi hava vit sent tær post í postkassan ella á Mínboks. Niðanfyri greiða vit frá innihaldinum. Á næstu síðum vegleiða vit um hugtøk og teigar í sjálvuppgávunum og um fylgiskjøl.

**Skattauppgerð 2021**

Hevur tú fingið eina skattauppgerð, eisini kalla framskundað skattauppgerð, skalt tú kanna eftir, um hon er røtt. Er hon tað, skalt tú ikki gera meira. Er hon ikki røtt, skalt tú senda TAKS eina sjálvuppgávu við rættaðum upplýsingum. Tú finnur skjøl og vegleiðing á www.taks.fo/sjug21.

**Kapitalvinningsuppgerð 2021**

Hevur tú fingið eina kapitalvinningsuppgerð, skalt tú kanna eftir, um hon er røtt. Er hon tað, skalt tú ikki gera meira. Er hon ikki røtt, skalt tú senda TAKS eina kapitalvinningssjálvuppgávu við rættaðum upplýsingum. Tú finnur skjøl og vegleiðing á www.taks.fo/kap21.

**Sjálvuppgávan 2021**

Hevur tú fingið eitt sjálvuppgávubræv, skalt tú lata inn sjálvuppgávu fyri 2021. Tú finnur skjøl og vegleiðing á www.taks.fo/sjug21.

**Kapitalvinningssjálvuppgávan 2021**

Hevur tú fingið eitt kapitalvinningssjálvuppgávubræv, skalt tú lata inn kapitalvinningssjálvuppgávu fyri 2021. Tú finnur skjøl og vegleiðing á www.taks.fo/kap21.

**Fylgibræv til sjálvuppgávuna/skattauppgerðina 2021**

Hevur tú goldið inn til eftirløn í sambandi við B-inntøku ella fingið vinningsbýti í 2021, so hevur tú fingið eitt fylgibræv til sjálvuppgávuna/skattauppgerðina. Vegleiðing verður givin í skrivinum.

**Ognaruppgerð 2021**

Hevur tú roknskaparskyldu, hevur tú fingið sendandi eina ognaruppgerð. Síggj vegleiðing um útfylling og innlating á www.taks.fo/ognaruppgerð21.

**Uppgerð yvir heilsutrygdargjald 2021**

Er heilsutrygdargjald títt broytt í 2021, hevur tú fingið skriv um tað. Vegleiðing verður givin í skrivinum.

## Lat inn á Borgaragluggganum ella á pappíri

**Á Borgaraglugganum**

Rita inn, vel Sjálvuppgáva 2021 > Fyll út sjálvuppgávu.

**Á pappíri**

Heinta sjálvuppgávuna ella kapitalvinningssjálvuppgávuna á omanfyrinevndu leinkjum, fyll út og lat inn.

## Gev tó gætur, at skalt tú lata inn roknskap, skalt tú lata inn á Borgaraglugganum

Set hann upp eftir roknskaparleistunum hjá TAKS. Finn skjøl og vegleiðingar á www.taks.fo/roknskapur21.




## Ognaruppgerð

Øll sjálvstøðugt vinnurekandi fáa ognaruppgerð sendandi. Sjálvstøðugt vinnurekandi ert tú, um tú hevur eitt v-tal.

Hevur tú fingið ognaruppgerð, ger tá neyðugar rættingar, og send uppgerðina við telduposti til taks@taks.fo.

## Írestandi skattur

Írestandi skattur undir 1.000 kr. fellur til gjaldingar í einum. Er hann yvir 1.000 kr., verður goldið í trimum. Eykagjald á 4% verður lagt afturat.

TAKS sendir inngjaldskort til at gjalda við. Kortið kann meldast til sjálvvirkandi gjalding við GS. Verður goldið á annan hátt, viðmerk tá "Írestandi skattur 2021 og skriva p-tal. Nýtir tú heimagreiðslu, kunna teg um valørdagin.

## Írestandi kapitalvinningsskattur

Írestandi kapitalvinningsskattur fellur til gjaldingar í einum. Er upphæddin undir 500 kr., fellur hon burtur. Goldið verður eins og við vanligum írestandi skatti. Viðmerk "Írestandi kapitalvinningsskattur 2021" og skriva p-tal.

## Hjúnafrádráttur

Hjúnafrádrátturin verður javnaður sjálvvirkandi á skattauppgerðini.

## Avlopsskattur

Avlopsskatturin er á kontu týsdagin, 22. mars 2022, annars síðsta arbeiðsdag í triðju viku hvønn mánað. Eykagjald á 4% verður lagt afturat.

## Inntøka, ið stavar frá eftirløn

Eftirløn og útlendskur skattur kunnu latast inn á Borgara-glugganum saman við øðrum inntøkum og frádráttum.

Donsk eftirløn er skattskyldig í Føroyum. Skattur, sum er goldin í Danmark, kann dragast frá. Hevur tú fingið eftirløn útgoldna í Danmark uttan at rinda avgjald har, er tað skylda tín at rinda í Føroyum.

## Eftirlønarfrádráttur

Inngjald til kapitaleftirløn, lutaeftirløn og lívrentu kann dragast frá skattskyldigu inntøkuni.

Frádrátturin fyri eftirlønargjald er tann upphædd, sum tú av skattaðum peningi hevur goldið í eftirløn í eftirlønar-felagi ella peningastovni, og sum hesi hava flutt um eftir-lønarskattaskipanina. Hevur tú goldið inn og ikki fingið frádrátt, skalt tú venda tær til eftirlønarfelagið ella peningastovnin. Frádráttur fyri føroyska eftirløn, egið inngjald, er forprentaður á framskundaðu skattauppgerðini, sjálvuppgávuni og á Borgaraglugganum.

## Húsaleiga

Tveir mátar eru at geva upp húsaleigu: við roknskapi ella sum bruttoskattur.

Gevur tú upp við roknskapi, skal roknskapurin fylgja við, tá sjálvuppgávan verður latin inn.

Bruttoskattur kann bert nýtast, um tú leigar út beinleiðis til privatfólk í minst tríggjar mánaðir. Tað er eisini ein treyt, at leigarin býr fast á staðnum.

Við bruttoskatti eru tær fyrstu 100.000 kr. skattafríar. Restin verður skattað við 25%.

Eiga fleiri persónar eini hús, er frádrátturin 100.000 kr. í alt. Eigur ein persónur fleiri hús, er frádrátturin somuleiðis 100.000 kr. í alt.

Les meira um húsaleigu á taks.fo/húsaleiga.

## Skjalprógv

Skjalprógv, sum er grundarlag undir sjálvuppgávuni ella kapitalvinningssjálvuppgávuni við tilhoyrandi skjølum, skal goymast í 5 ár.

## Skal onkur orðna sjálvuppgávuna fyri teg á Borgaraglugganum?

So kanst tú geva viðkomandi eina fulltrú at nýta gluggan í tínum navni. Ger tað beinleiðis á Borgaraglugganum undir Grundupplýsingar/fulltrúir, ella heinta fulltrúina á www.taks.fo/fulltrú21 og lat inn á pappíri.

## Freist

Freistin at lata inn sjálvuppgávu 2021 o.a. er **2. mai 2022**

## Um ikki verður rættstundis innlatið

Er fullfíggjað sjálvuppgáva og kapitalvinningssjálvuppgáva ikki rættstundis innlatin, hevur TAKS heimild at seta inntøkuna til eina metta upphædd og harafturat at áleggja sekt. Sektin er í minsta lagi 1.000 kr.

## Rættur skattur er tín ábyrgd

Tú gevur TAKS upplýsingar undir sektarábyrgd sambært skattalógini. Kanna tí altíð eftir, at tølini á skattauppgerðini, sjálvuppgávuni, kapitalvinningssjálvuppgávuni og kapital-vinningsuppgerðini eru bein, og at alt er komið við.




# Vegleiðing til teigarnar á sjálvuppgávuni 2021

**101 Inntøkur**

▪ Inntøkur, ið eru útgoldnar um skattaskipanina, eru skrásettar undir hesum teigi.

▪ Hygg eftir, um skrásetta inntøkan er røtt, og um nøkur inntøka vantar.

**180 Fiskiveiðuinntøka sbrt. § 25a**

▪ Hygg eftir, um frádráttur tín í teigi 380 er í lagi.

▪ Fiskiveiðufrádráttur er 14% av inntøkuni, tó í mesta lagi av kr. 470.000.

**185 Ítróttainntøka**

▪ Samsýning til dómarar, linjuverjar, venjarar innan ítrótt og hjálparar hjá ítróttafeløgum skal skrásetast her, um inntøkan ikki fer upp um 50.000 kr.

▪ Samsvarandi frádráttur skal skrásetast í teig 385, men fer upphæddin upp um 50.000 kr. verður eingin frádráttur givin.

▪ Er upphæddin ikki skrásett her, skal borgarin venda sær til ítróttafelagið um at rætta hetta.

**220 Inntøka av landbúnaði sambært hjáløgdum roknskapi**

▪ Roknskapur skal latast inn talgilt á Borgaraglugganum.

**230 Inntøka av húsaleigu sambært hjáløgdum roknskapi**

▪ Vísir roknskapurin vinning, verður hesin teigurin nýttur.

▪ Verða øll húsini útleigað part av árinum, verða renturnar býttar í privatar og vinnuligar samsvarandi útleigutíðini.

▪ Bert vinnuligt hall kann dragast frá.

▪ Er partur av húsunum útleigaður í heilt ár ella part av árinum, kunnu renturnar ikki dragast frá í uppgerðini yvir húsaleigu. Víst verður tá til rentustuðulin.

▪ Húsaleiga uttanlands skal setast á fylgiskjal til sjálvuppgávu 2021 í teig 720.

**240 Inntøka av egnum virki (uttan løn og avskrivingar) sambært hjáløgdum roknskapi**

▪ Roknskapur skal latast inn talgilt á Borgaraglugganum.

▪ Fyri roknskap uttanlands skal inntøkan setast á fylgiskjal til sjálvuppgávu 2021 í teig 725.

**241 Inntøka av egnum virki (við løn og/ella avskriving) sambært hjáløgdum roknskapi**

▪ Roknskapur skal latast inn talgilt á Borgaraglugganum.

▪ Fyri roknskap uttanlands skal inntøkan setast á fylgiskjal til sjálvuppgávu 2021 í teig 725.

**243 Inntøka av hýruvogni**

▪ Roknskapur skal latast inn talgilt á Borgaraglugganum.

**244 Inntøka av útróðri**

▪ Roknskapur skal latast inn talgilt á Borgaraglugganum.




## Vegleiðing til teigarnar á sjálvuppgávuni 2021

**251** **Fríur bilur**

▪ Starvsfólk, høvuðspartaeigarar o.o. verða skattað av hesum virði, um bilurin verður nýttur til privata koyring svarandi til 10.000 km ella meira árliga. Koyring millum heim og arbeiðspláss er at meta sum privat koyring.
▪ Virðið verður mett eftir tyngd á bilinum:
1100 kg og undir, 56.000 kr.
1101 – 1300 kg, 65.000 kr.
1301 – 1500 kg, 78.100 kr.
1501 og meira, 87.900 kr.

▪ Bussar upp til 10 persónar, sum verða nýttir til hýruvognskoyring 19.200 kr.

▪ Vøruvognar og aðrir bilar: upphæddin er 60% av ásetta virðinum.

▪ Um ikki full upphædd verður uppgivin, so er krav um at lata koyribók inn.

**260** **Onnur inntøka, vanliga eingangsinntøkur**

▪ Her skulu setast allar inntøkur, sum ikki eru í einum av hinum teigunum. Tilskilast skal, hvat slag av inntøku, talan er um.

▪ Eingangsinntøkur, ið eru uppgivnar, eru skrásettar, og fyribilsskatturin er goldin. Kanna eftir, um inntøkan er røtt.

▪ Uppihaldspeningur frá sundurlisnum/fráskildum hjúnafelaga, ið er goldin beinleiðis til móttakaran. Hevur Almannaverkið goldið uppihaldspeningin, ella er peningurin goldin um skattaskipanina, er hetta skrásett í teigi 101, og skal upphæddin tí ikki setast í teig 260.

▪ Gávur, ið ikki eru samsýning fyri starv ella vinnu.

▪ Gávur, ið ikki eru peningagávur.

▪ Vinningur við sølu av fastari ogn.

**291** **Fríur bústaður**

▪ Fyri frían bústað, 1.095 kr. fyri fermeturin.

**292** **Fríur kostur**

▪ Fyri frían kost, tríggjar máltíðir um dagin, 63 kr.

▪ Fyri frían kost, tvær máltíðir um dagin, 48 kr.

▪ Fyri frían kost, ein máltíð um dagin, 36 kr.

**293** **Fríur hiti**

▪ Fyri frían hita, 20.500 kr. (olja/fjarhiti)

▪ Fyri frían hita, 14.850 kr. (el/jarðhiti)

**294** **Frítt el**

▪ Fyri frítt el, 10.300 kr.

**296** **Aðrir fríir ágóðar**

▪ Eru aðrir ágóðar, skulu teir setast í henda teigin.




## Vegleiðing til teigarnar á sjálvuppgávuni 2020

**310** **Eftirlønargjald**

- Frádrátturin fyri eftirlønargjald er tann upphædd, sum tú av skattaðum peningi hevur goldið í eftirløn í eftirlønarfelagi ella peningastovni, og sum hesi hava flutt um eftirlønarskattaskipanina.
- Um tú hevur goldið inn og ikki fingið frádrátt, skalt tú venda tær til eftirlønarfelagið ella peningastovnin.

**316** **Lærlingafrádráttur**

- Lærlingafrádrátturin er í mesta lagi 50.000 kr. um árið
- Er steðgur í lærutíðini, kunnu teir dagarnir ikki dragast frá

**320** **Hall av landbúnaði sambært roknskapi**

- Kann bert dragast frá, um talan er um vinnuligt virksemi.

**330** **Hall av húsaleigu sambært roknskap**

- Kann bert dragast frá, um talan er um vinnuligt virksemi.
- Fyri roknskap uttanlands skal úrslitið skrásetast á fylgiskjal til sjálvuppgávu í teig 720.

**340** **Hall av egnum virki uttan løn og avskriving sambært roknskapi**

- Kann bert dragast frá, um talan er um vinnuligt virksemi.
- Fyri roknskap uttanlands skal úrslitið skrásetast á fylgiskjal til sjálvuppgávu í teig 725.

**341** **Hall av egnum virki við løn og /ella avskriving sambært roknskapi**

- Kann bert dragast frá, um talan er um vinnuligt virksemi.
- Fyri roknskap uttanlands skal úrslitið skrásetast á fylgiskjal til sjálvuppgávu í teig 725.

**343** **Hall av hýruvogni sambært hjáløgdum roknskapi**

- Kann bert dragast frá, um talan er um vinnuligt virksemi.

**344** **Hall av útróðri sambært hjáløgdum roknskapi**

- Kann bert dragast frá, um talan er um vinnuligt virksemi.

**350** **Tap av lánum og ábyrgdum til vinnuvirki sambært § 33 nr. 2 í skattalógini**

- Veitt lán ella givin ábyrgd til banka ella annan áognara áðrenn 3. desember 1994 og av hesi orsøk hevur verið fyri tapi.

**380** **Fiskiveiðufrádráttur**

- Hevur arbeiðsgevarin boðað frá, er frádrátturin skrásettur á sjálvuppgávuni.
- Fyri inntøku uttanlands skal frádrátturin skrásetast á fylgiskjal til sjálvuppgávu í teig 750.

**385** **Ítróttafrádráttur**

- Um persónur hevur inntøku undir teigi 185 upp til 50.000 kr., verður frádráttur upp á somu upphædd skrásettur her.
- Er ítróttainntøkan omanfyri 50.000 kr. verður eingin frádráttur latin.

**499** **Hall uttan frádráttarrætt**

- Er hall av ítrivi ella hjávinnu.
- Verða ikki mett sum vinnurekandi eftir skattalógini.
- Hava bókhaldsskyldu sambært lógini og skyldu at lata inn roknskap.
- Roknskapur skal latast inn á Borgaragluggan sum excel-fíla.




## Vegleiðing til fylgiskjølini til sjálvuppgávuna 2021

Upplýsingar, sum skulu á fylgiskjalið til sjálvuppgávuna, kunnu skrásetast beinleiðis á Borgaraglugganum saman við sjálvuppgávuni. Fylgiskjalið skal altíð latast inn saman við sjálvuppgávuni.

Allar upphæddir skulu gevast upp í fremmandum gjaldoyra.

### Lønarinntøka á landi

**701** Frá útlendskum arbeiðsgevara ella frá føroyskum arbeiðsgevara, ið hevur stovnað fastan rakstrarstað uttanlands.

**710** Listafólk og ítróttafólk. Samsýning til útinnandi listafólk so sum sjónleikarar, filmslistafólk, útvarpslistafólk, sjónvarpslistafólk, tónleikarar, fimleikarar og ítróttafólk.

**730** Nevndarsamsýning.

**740** Alment starv. Løn frá øllum almennum stovnum. Veitingar til konslar og diplomatar.

**748** Onnur inntøka. Til dømis gáva, fráfaringarsamsýning, arbeiðsloysispeningur, sjúkrapeningur, barnapeningur o.s.fr.

### Loftferðsla, undantikið oljuvinna

**744** Arbeiði umborð á flogfari og tyrlu.

### Eftirlønarinntøka, frádráttir, pensión o.a.

**715** Eftirlønarinntøka. Pensión, almannaveiting, lívrenta, lutaeftirløn o.a.

**791** Eftirløn uttanlands sambært hjáløgdum ársyvirliti. Fyri tey, sum eru frítikin at gjalda inn til eftirløn í Føroyum.

### Inntøka sambært roknskapi

**720** Netto leiguinntøka. Roknskapur skal latast inn talgilt á Borgaraglugganum.

**725** Egið virki sambært roknskapi. Roknskapur skal latast inn talgilt á Borgaraglugganum. Sjálvstøðugt vísinda-, bókmenta-, útbúgvingar- ella undirvísingarvirksemi og sjálvstøðugt virksemi sum lækni, advokatur, verkfrøðingur, arkitektur, tannlækni, grannskoðari o.a.

### Lønarinntøka við skipi, boripalli ella tyrlu

**750** Fiskiveiðuinntøka eftir §§ 25a ella 25b í skattalógini. Frádrátturin er ymiskur, alt eftir um inntøkan er úr Norðurlandi ella ikki.

**760** Inntøka eftir § 25b í skattalógini. Til dømis forkanning, rannsókn, kolvetni, seismikkur, undirsjóvararbeiði, akkersarbeiði, boriarbeiði og annað. Hýra/løn fyri arbeiði innan fyri økið hjá sáttmálabundna landinum.

**765** Inntøka eftir § 25b í skattalógini. Eitt nú ferðaskipi, farmaskipi, veitingarskipi, bjargingarskipi, bjargingartyrlu e.ø.

**770** Lønarinntøka frá øðrum skipi. Til dømis brunnbáti, sandbáti, vindmylluskipi, innanríkissigling, DAS o.ø.

**780** DIS-inntøka.




# Vegleiðing til kapitalvinningssjálvuppgávuna 2021

Hall sambært kapitalvinningssjálvuppgávuni kann ikki dragast frá í aðrari skattskyldigari inntøku.

Vísir kapitalvinningssjálvuppgávan hall, og ikki er rúm fyri halli í verandi ári, kann hallið flytast fram og setast í K10. Tó kunnu rentuútreiðslur (K19) bert flytast fram í 5 ár.

Vísa K-teigar vinning, verður vinningurin skattaður við 35%.

Les meira á taks.fo/kap21. Les t.d. um staðfestan vinning og tap.

**K1 Vinningur av partabrøvum o.ø. (sbr. § 4)**

- Her skal vinningur av sølu ella aðrari avhendan av partabrøvum, íløgubrøvum, virðisbrøvum og umbýtiligum lánsbrøvum skrásetast.
- Tað er bert ásannaður/staðfestur vinningur (realisatiónsprinsippið), sum skal gevast upp til skattingar.

**K2 Vinningur av fíggjarkrøvum og skuld (sbr. § 6)**

- Her skal vinningur við innfrían, sølu og aðrari avhendan enn sølu av fíggjarkrøvum og skuld setast.
- Tað er bert ásannaður vinningur (realisatiónsprinsippið), sum skal gevast upp til skattingar.
- Vinningur skal bert gevast upp til skattingar, um hann er meira enn 1.000 kr. til samans.

**K4 Vinningur av keyps- og sølurættindum (sbr. § 8)**

- Her skal setast vinningur av keyps- og sølurættindum til partabrøv, íløguprógv og tílík virðisbrøv og umbýtilig lánsbrøv. Her skal eisini setast vinningur av keyps- og sølurættindum til fíggjarkrøv, herundir lánsbrøv, pantibrøv og skuldarbrøv
- Tað er bert ásannaður vinningur (realisatiónsprinsippið), sum skal gevast upp til skattingar.

**K5 Vinningsbýti frá føroyskum feløgum (sbr. § 9)**

- Skal við í uppgerðina við fullari upphædd, hóast skatturin er afturhildin av felagnum.

**K6 Vinningsbýti frá útlendskum feløgum (sbr. § 9)**

- Skal við í uppgerðina við fullari upphædd, hóast skatturin er afturhildin av felagnum.

**K7 Rentuinntøkur frá føroyskum peningastovni (sbr. § 10 og § 16)**

- Hesar eru skrásettar á kapitalvinningsuppgerðina og kapitalvinningssjálvuppgávuna. Hygg eftir, at hesar eru rættar.

**K8 Aðrar rentuinntøkur (sbr. § 10)**

- Rentuinntøkur, ið ikki eru skrásettar, skulu setast her, sí fylgibræv.

**K10 Hall frá eldri árum (sbr. § 14, stk. 3 og 4)**

- Verður skrásett her og kann verða drigið frá í uppgerðini fylgjandi árini í tann mun, tað ikki er rúm fyri tí í møguligum nettovinningi eitt eldri ár.




# Vegleiðing til kapitalvinningssjálvuppgávuna 2021

**K11** **Tap av partabrøvum o.ø. (sbr. § 4)**

- Heruppií eru partabrøv, íløgubrøv, virðisbrøv og umbýtilig lánsbrøv.
- Frádráttarbæra tapið kann ongantíð gerast størri enn tapið, sum upprunaliga útveganarvirðið av virðisbrøvunum hevði givið, um selt varð til sama prís.
- Bert staðfest tap kann dragast frá.

**K12** **Tap av fíggjarkrøvum og skuld (sbr. § 6)**

- Tap kann bert roknast við í uppgerðina, um láns-, skuldar- og pantibrøvini eru skrásett á virðisbrævamarknaði.

**K14** **Tap av keyps- og sølurættindum (sbr. § 8)**

- Tap av keyps- og sølurættindum skal roknast við í uppgerðina av skattskyldigu inntøkuni tað árið, tapið er ásannað.

**K19** **Rentuútreiðslur til keyp av virðisbrøvum (sbr. § 10, stk. 3)**

- Rentuútreiðsla av láni, ið er tikið í sambandi við keyp av virðisbrøvum, kann dragast frá her.
- Frádráttur av rentum, er bert galdandi fyri lán til keyp av partabrøvum, sum eru tikin áðrenn 1. januar 2017.
- Óbrúktar rentuútreiðslur kunnu flytast fram í 5 ár.

**K20** **Goldin skattur av rentum í Føroyum (sbr. § 16)**

- Sum er goldin skattgjaldarans vegna, verður skrásettur her.

**K21** **Goldin skattur av vinningsbýti frá føroyskum feløgum (sbr. § 15)**

- Vinningsbýtisskattur, sum útlutandi felagið hevur goldið skattgjaldarans vegna, verður drigin frá her.

**K22** **Skattur, goldin uttanlands (sbr. § 19)**

- Kapitalvinningsskattur, goldin uttanlands, verður drigin frá her.
- Skattgjaldarin skal kunna skjalprógva tann goldna skattin, tá TAKS biður um tað.